# Nógvur smáur svartkjaftur sunnanfyri

**Jákup Sverri, túrur nr. 2210**

**Tíðarskeið: 23/3-6/4 2022**

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen



**Endamál:** *At kanna nøgdirnar av svartkjafti í økinum sunnan fyri Føroyar og í norðara parti av gýtingarøkinum. Ekkókanningin er partur av felags kanningunum av svartkjafti, skipaðar undir ICES saman við Noregi og ES (Hollandi, Írlandi og Spania).*

---

## Samandráttur

Ekkókanningar av svartkjafti sunnan fyri Føroyar suður í bretskan og írskan sjógv vóru gjørdar í tíðarskeiðinum 23. mars til 6. apríl 2022. Fyribilsúrslitini vísa, at nógv er til av smáum svartkjafti í føroyskum øki í ár. Talan er serliga um 2020 árgangin og so eisini 2021 árgangin. Hetta er fyri tað mesta óbúgvin fiskur, sum stendur víða um í sunnara parti av føroyskum øki og nakað suður um markið (Mynd 1). Longur suðuri var svartkjaftur at síggja eystanfyri, fram við írsku og skotsku hellingini, meðan sera lítið var úti á djúpum sjógvi. Her var talan um nakað størri svartkjaft, sum hevði gýtt. Longdarbýti og aldursbýti av svartkjafti er víst í ávikavist Mynd 2 og Mynd 3. Miðallongdin var einans 23 cm og miðalvektin 80 g í okkara prøvum í ár. Vit frættu frá hinum rannsóknarskipunum, sum kannaðu økini longur suðuri, at gýtandi svartkjaftur var at síggja á leiðunum vestur og norður av Porcupine bankanum.




*Mynd 1. Akustiskar skrásetingar av svartkjafti ($s_A$, $m^2/nm^2$) sunnan fyri Føroyar 23/3-6/4 2022. Nøgdin er víst sum sirklar, har støddin á sirklinum vísir, hvussu nógv av svartkjafti stóð undir skipinum. 200 og 500 botnlinjur eru vístar.*




*Mynd 2. Longdarbýti (vinstrumegin) og aldursbýti (høgrumegin) av svartkjafti frá kanningunum 23/3-6/4 2022.*

## Um túrin

Túrurin byrjaði við at kalibrera (stilla) ekkóloddini inni á Skálafjørðinum. Síðani var farið suður í írskan sjógv, har túrurin skuldi byrja. Veðrið var sera gott allan túrin og tilsamans 26 støðir vórðu tiknar, har hiti, salt og æti bleiv mátað. Tóvað varð eftir svartkjafti, tá hann sást á ekkóloddinum (Mynd 1).

Endaligu úrslitini frá felags kanningunum verða tøk, tá tølini frá øllum luttakandi skipunum verða viðgjørd seinni í apríl.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært Sýnishondbókini. Umframt longd og vekt av svartkjafti vóru nytrur av pørtum av veiðuni tiknar til aldursgreining.

## Reiðskapur

Multpelt 832 flótitrol og 6 $m^2$ Injector lemmar. CTD og WP2-glúpur.

## Viðmerkingar

Kanningin er skipað sum ein altjóða felags kanning undir ICES, har Føroyar luttaka saman við Noregi, Írlandi, Hollandi og Spania. Samlaða nøgdin av svartkjafti frá øllum skipunum verður roknað síðst í apríl.

## Fólk við frá Havstovuni

Jan Arge Jacobsen (kanningarleiðari)

Leon Smith, Dan Askam og Jens Arni Thomassen